## EG MEINI TAÐ

# Reality-tv – avbjóðing ella avmarkan



*Elin Heinesen:*

Í mun til vanligar faktasendingar, leggja reality-tv sendingarnar mestan dentin á undirhaldsvirði fram um upplýsingarvirði. Tær snúgva seg næstan bara um psykologisk viðurskifti, har lagt verður upp til, at síggjararnir skulu liva seg inn í upplivingarnar hjá luttakarunum í sendingini. Hetta verður gjørt við at fortelja spennandi søgur, har síggjarin er við 'har tað hendir', meðan tað hendir - er til staðar, meðan politisturin endiliga fær fatur í sinnissjúka brotsmannin, ella tá myndugleikarnir koma eftir barninum hjá narkomaninum, ella tá foreldini fáa at vita á sjúkrahúsinum, at barn teirra er álvarsliga sjúkt osfr. Aðrar reality-tv sendingar senda úrvaldar luttakarar til eitt gjørt ella fremmant umhvørvi, har tey møta nøkrum líka so gjørdum avbjóðingum, tey skulu vinna á, men luttakararnir og kenslurnar hjá luttakarunum kunnu vera eins veruligar fyri tað.

Sendingar av hesum slag sum t.d. Robinson, Baren og Big Brother hava sett met í síggjaratølum seinastu árini. Áhugin fyri júst hesum sendingunum er dalaður eitt sindur, nú tá fyrsta forvitni er nøktað, men enn er reality-tv nakað av tí best umtókta sjónvarpsundirhaldinum. Og sjónvarpsstøðirnar finna uppá meira og meira víðgongdar sendingar fyri at lokka síggjararnar at skifta til júst teirra rás.

Seinasta nýggja reality-tv sendingin, sum TV3 fer at senda í nýggja árinum er sendingin 'Fear Factor', sum hevur havt sera nógvar síggjarar í øðrum londum. Hetta er ein sending, har fólk verða blakað út í víðgongdar ræðsluvekjandi upplivingar. Tey verða hongd upp yvir avgrundir, skulu leypa t.d. frá einum lastbili til ein annan, meðan koyrt verður við stórari ferð, lata seg verða grivin í kyktum og ormum — ella skulu eta ormarnar! Og meira í den dur.

Hví elska síggjararnir hetta - at velta sær runt í kreppum og trupulleikum hjá øðrum fólki? Hvat er tað, sum er so áhugavert við tí? Kanska er tað so, at vit ikki longur meta okkara lívsgóðsku í mun til, hvussu støðugt og friðsamt vit liva. Vit vilja hava avbjóðingar — helst so nógvar sum gjørligt. Á arbeiðsplássunum ganga vit til menningarsamrøður, har vit tosa um, hvussu vit skulu menna okkum fakliga og persónliga. Í parlagnum vilja vit hava møguleika til at vaksa bæði saman og hvør sær. Vit eru forvitin, vilja vita og royna meira. Sjónvarpið roynir bara at nøkta henda glúpandi tørvin eftir avbjóðingum — við at vísa avbjóðingar, onnur útseta seg sjálvi fyri.

Sjónvarpið gevur okkum harvið eisini møguleika at bjóða okkara egnu mørkum av. Tað er at fara um mørk at síggja onnur fólk í djúpari persónligari kreppu. Tað er at fara um mørk at síggja onnur fólk fara í song saman — í veruleikanum. Hetta er eitt psykologiskt spæl við okkara mørk, sum er vágaligt og sum okkum dámar, tí vit velja tað framum so nógv annað, vit kundu sæð í sjónvarpinum

Vit kenna, hvussu hárini í nakkanum ývna, tá onkur av luttakarunum ger okkurt serliga býtt, ella tá luttakararnir koma sæt út í ósemjur og stríð, har fasadurnar verða ryktar av teimum. Vit krympa tærnar og hugsa: Gott tað ikki eri eg! Soleiðis njóta vit spenningin og verða avbjóðað — uttan sjálvi at líða undir avbjóðingini. Hetta er ein virkin nøktan av sansunum.

Síggj-tað-henda-beint-nú, áhugin fyri tí sensationella, tann persónligi vinkulin, dyrkanin av kenslunum — alt samalt eyðkennir reality-tv sendingar. Men spurningurin er, um ikki reality-tv gevur eina sera avmarkandi mynd av veruleikanum. Fáa vit veruliga víðkað okkara sjónarring, tá vit lata okkum undirhalda av hesum sendingunum? Vit síggja jú bara hvat hendir — aldrin hví tað hendir.

Vikuskifti
Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro









*Frá jólahaldinum á Barnadeildini á Landssjúkrahúsinum*

# Skapa hugna og gleði undan jóladegi

Tá børn og ung hava góðar møguleikar at fáa tónleikafrálæru er tað eitt tekin um, at tað grør um gangandi fót. Tí er hetta at skapa tónleikafrálæruni hjá uppvaksandi ættarliðinum góðar umstøður tann besta jólagávan, sum bæði myndugleikar og tann, ið varir av øllum, kunnu geva lítla oyggjasamfelagnum Føroyum

HUGLEIÐING UM TÓNLEIKAJÓL
*Orð og myndir: Jan Müller*

Børnini og tey ungu, ið ganga í Tórshavnar Musikskúla, eru á hvørjum ári undan jólum við til at skapa hugna og gleði. Allan desember mánað sleppa tey at vísa øðrum, hvat tey hava lært hjá frægum tónleikalærarum. Og tað er einki at siga til, at boð eru eftir hesum fittu og góðu ungfólkunum við sínum violinum, guitarum og øðrum ljóðførum. Tí tey eru við til at skapa ein serstakan dám undan jólahøgtíðini. Og har tað ikki eru boð eftir teimum, har fara tey sjálvi út og bjóða seg fram.

Tey vitja á sjúkrahúsum, á røktar- og ellisheimum, á dagstovnum, í skúlum og hvar tað skal vera. Man kann lættliga siga, at hesi ungu, sum kanska einaferð í framtíðini fara at teljast millum okkara bestu tónleikarar, eru til konsert nærum hvønn dag. Hetta er samtíðis sera góð venjing, sigur ein av tónleikalærarunum, Bo Isholm, sum nú um dagarnar stóð á odda fyri umleið 16 ungum guitarspælarum, ið m.a. spældu til jólahaldið á Barnadeildini á Landssjúkrahúsinum. Og saman við teimum vórðu eisini 10-15 ungir violinistar undir leiðslu av enn einum kønum musikskúlalærara, Nikos Kampnas. Í góðan tíma spældu børn og ung fyri sjúku børnunum, starvsfólki og avvarðandi á B4, har pyntað varð til jóla. Eisini jólamaðurin Kjøtkrókur vitjaði og tók sær væl av børnunum.

Og soleiðis fara tey úr einum stað í annað. Tey spæla fyri teimum gomlu og sjúku á pleygudeildini á Landssjúkrahúsunum, tey spæla fyri teimum, sum hava fingið sítt heim á Lágargarði og soleiðis kundi tú hildið fram. Á henda hátt gera tey bæði sær sjálvum væl og teimum tey spæla fyri.

Bo Isholm heldur tað er eitt gott tiltak at fara út úr skúlastovuni allan desember mánað. Hann heldur tað er gott fyri tey ungu og fyri øll tey, sum lýða á. Tað er eisini við til at gera henda so týdningarmikla og grundleggjandi skúlan meira sjónligan í samfelagnum.

Tað skilst eisini á honum, at tað eru góðir dagar í Musikskúlanum í løtuni, serliga eftir at skúlin hevur fingið eykajáttan til fleiri lærarar. Tað hevur minkað um bíðirøðirnar, tó at tað framvegis innan nøkur øki eru langir bíðilistar, eitt nú til klaver og guitar. Tað ganga eini 60 til guitar í løtuni, men bíðitíðin er umleið eitt ár. Til klaver er hann tó fleiri ár. Soleiðis hevur tað altíð verið, tó at tað eru hendar nógvar betringar. Í dag ganga umleið 500 børn og ung á Musikskúlanum í Havn. Um alt landið er talið omanfyri 1000.

Eftir at hava sæð og hoyrt henda fjølmenta og evnaríka skara av ungfólki spæla fyri børnum og gomlum, er eingin ivi longur um tann ómetaliga týdning, sum Musikskúlarnir við sínum evnaríku lærarum hava fyri ikki bara blómandi mentanarlívið, men fyri alla samfelagssálina sum heild.

Tá samfelagið skapar og betrar umstøðurnar hjá børnum og ungum at fáa tónleikafrálæru, er tað heilt givið eitt tekin um, at tað grør um gangandi fót. Tí er hetta at skapa tónleikafrálæruni fyri uppvaksandi ættarliðum góðar umstøður tann besta jólagávan, sum bæði myndugleikar og tann, ið varir av øllum, kunnu geva lítla oyggjasamfelagnum Føroyum.



Í Føroyum verður á hvørjum ári nógv tosað um, hvørt jólini verða hvít ella ikki. Í Los Angeles kunnu vit gloyma alt um hvít jól og spurningurin er ikki um men heldur hvussu heitt tað verður á jólum



*Eisini á Rodeo Drive í Beverly Hills er pyntað til jóla. Hetta er ein hin dýrasta handilsgøta í heiminum. Longst burturi á myndini sæst The Beverly Regent Hotel, har Julia Roberts og Richard Gere hildu til í filminum Pretty Woman.*



*Hetta húsið, sum stendur á Sunset Boulevard í Beverly Hills, er jólapyntað, og líkist mest einum ævintýrslotti.*

# Jól í Los Angeles

JÓL
*Elin Winther Poulsen*

Nú eru jólini í hondum, og eisini her í Los Angeles verður stákast óført til høgtíðina. Seinasta hósdag í oktober mánaði halda vit Thanksgiving. Fyri flestu amerikanarar man henda høgtíð vera ein hin týdningarmiklasta á árinum, og hetta vikuskiftið fara sera nógv fólk út at ferðast, tey flestu heim til familjuna at eta kalkun og hátíðarhalda Thanksgiving. Upprunaliga vóru tað fyrstu niðursetufólkini, ið hildu Thanksgiving at takka fyri fyrsta heystið og grøðina, og einki átrúnaðarligt er tengt at høgtíðini. Hetta merkir, at allir amerikumenn framvegis kunnu savnast um júst hesa høgtíðina, tí í Ameriku, og serliga her í Los Angeles, eru sera nógv ymisk fólkasløg savnað, og sostatt eisini nógvar religiónir. Tí eru eisini nógv, ið als ikki halda jól.

Í Westwood, her vit búgva, og í Beverly Hills búgva sera nógvir jødar, og í skúla og barnagarði, har okkara børn ganga, er helvtin av børnunum jødar. Jødarnir halda, sum vera man, ikki jól, og børnini hoyra einki um jólaboðskapin í skúlanum. Tað er, heilt einfalt, ikki loyvt at undirvísa børnum í átrúnaðarligum evnum, og tey fáa t.d. ikki jólafrí, men vetrarfrí. Og fólk her ynskja heldur ikki hvør øðrum Gleðilig Jól, men siga heldur Happy Holidays.

FRÍGGJADAGURIN eftir Thanksgiving er størsti útsøludagur um alt landið, og henda dagin verður eisini jólapyntið sett á hillarnar. Síðani tá hava handlarnir fyrireikað okkum og boðað frá, at jólini nærkast í hvørjum, og at tíð aftur er at brúka alt ov nógvan pening uppá alt ov nógv óneyðugt og ónýtiligt órudd.

Fyri handilsmenninar ræður sjálvandi um at selja so nógv sum til ber, og á hesum økinum er einki fólkaslag so dugnaligt sum júst tað amerikanska. Nú skal eg ikki gera handilsmenninar í Havn til reinar einglar, sum einans hugsa um gleðiboðskapin í hesum døgum, men her í Ameriku eru jólini, eins og allar aðrar høgtíðir, ómetaliga handilsligar. Fórt tú t.d. inn í ta størstu handilsmiðstøðina í Beverly Hills fyrst í november mánaði, sat jólamaðurin longu í einum lenistóli og bíðaði eftir foreldrum, sum høvdu hug at seta børnini í fang hansara, og síðani rinda 30 dollarar fyri eina mynd. Og alla staðni eru hús, vegir og handlar ovurpyntað við milliónatals ljósperum, hjørtum og stjørnum. Nógv múgvandi fólk búgva, sum kunnugt, í Beverly Hills, og har eru húsini pyntað so listarliga, og summi líkjast einamest ævintýrslottum. Gloymd er orkukreppa, nú trø og hús eru pyntað til jóla.



*Halgir, Marianna, Eva og kavamaðurin.*

Serliga eitt á Sunset Boulevard miðskeiðis í Beverly Hills er víðagitið, tí tað er so vakurt og ovurhondspyntað, at fólk í hópatali steðga á at hyggja og taka myndir. Eftirgjørdur kavi liggur framvið garðinum, og jólatræið á grasplenuni er eins stórt og tað á Tinghúsvøllinum.

JÓLAFYRIREIKINGARNAR í ár eru merktar av fylgjunum av yvirgangsálopunum hin 11. september, og av, at landið er í kríggi. Handilsfólk óttast fyri, at áhaldandi yvirgangshóttanir og vandin fyri Anthrax skulu fáa fólk at sita heima, heldur enn at fara til handils. Fyribils metingar siga eisini, at hesin ótti er grundaður, og at fólk neyvan fara at keypa eins nógv og vanligt til jóla. Tey flestu hava ikki tann sama hugin at fara í handlarnar, og nógv hava minni pening at keypa jólagávur fyri.

Bara í Californiu eru fleiri enn 100.000 fólk vorðin arbeiðsleys síðani 11. september, og í oktober mánaði mistu fleiri amerikanarar arbeiðið, enn annan mánaða tey seinastu 20 árini. Tey, sum eru so heppin at fáa arbeiðsloysisstuðul, fáa í miðal 140 dollarar ella góðar 1000 krónur um vikuna. Men einans 40 % av teimum, sum eru vorðin arbeiðsleys, fáa stuðul, so hjá nógvum verður smáligt við jólagávum í ár.

Frá almennari síðu verður nógv gjørt burturúr at sannføra fólkið um, at »shopping is patriotism«, og Bush, forseti, heitir í fjølmiðlunum so staðiliga á amerikanarar um at brúka pening, so handilslívið ikki steðgar upp.

Í FØROYUM verður á hvørjum ári nógv tosað um, hvørt jólini verða hvít ella ikki. Útvarpið hevur í jólavikuni dagligt samband við Petur Skeel ella Veðurstøðina í Keypmannahavn at kanna útlitini fyri jólakava. Í Los Angeles kunnu vit gloyma alt um hvít jól og spurningurin er ikki um men heldur hvussu heitt tað verður á jólum. Eitt sindur torført at koma í jólahýr í hesum veðrinum, og løgið er at fara í sandalum í býin at keypa jólatræ.

Jólakavi ella ikki: Heima hjá okkum stendur ein kavamaður úr plastikki og sveittar í sólskininum úti á altanuni. Hann er hálvanannan metur høgur, og hevur eina ravmagnsperu í búkinum. Um kvøldið stendur hann so fittur og lýsir til stóra fragd fyri børnini, sum sjálvandi heldur vildu sloppið at gjørt ein rættiligan kavamann heima í Føroyum á jólum.

UPPRUNALIGA høvdu vit roknað við gestum úr Føroyum til jóla. M.a. orsakað av tí, sum hendi hin 11. september, vórðu hesar ætlanir broyttar, og gestirnir settust aftur. Hetta halda vit vera ógvuliga stórt spell, ikki minst tí, at millum gestirnar var ein framúr góður kokkur, sum skuldi hava ábyrgdina av jóladøgurðanum. Ístaðin noyðast vit sjálvi í holt við dunnur, rís-a-la-mande og tað, sum annars hoyrir jóladøgurðanum til. Hetta er sjálvandi risky business, men vónandi verða øll mett, kortini.

Teir seinastu tríggjar mánaðirnar hava vit havt Alexandru, yngstu fastrina úr Klaksvík í húsinum. Tá hon í gjár setti seg í flogfarið og legði leiðina heim til Klaksvíkar at halda jól, vóru vit fleiri, sum høvdu hug at goyma okkum í kuffertinum. Tí hóast vit halda eini nøkulunda »ordilig« jól her, er tað ikki tað sama, sum at vera heima um høgtíðina. Ikki bara ta løtuna, tað tekur at eta dunnuna, og at dansa um jólatræið sakna vit, men eins nógv allan jólamángt heima. Vit hava sjálvandi lyndi til at romantisera eitt sindur, og ímynda okkum hvítan kava og stilli, kaffi og heitt kakao á Kondittarínum o.s.fr. Veruleikin er, sum kunnugt, ofta ein annar: Eingin kavi, men nógv regn, stress ístaðin fyri hugnaligar løtur á Kondittarínum. Hetta er í øllum førum tað, vit hava at ugga okkum við, tá heimlongsulin gerst ov ringur.

Og so lata vit okkum í sandalir, fara ein túr út í sólskinið, og gleða okkum til næsta ár, tá vit halda jól í Hoyvík!